NORÐOYA SPARIKASSI



# Corporate Governance 2022

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. +298 475000
Fax +298 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Fuglafjørður afdeling:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 475000

Tórshavn afdeling:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000
Fax +298 476015

## Frágreiðing um góða virkisleiðslu 2022

Norðoya Sparikassi er limur í Finans Danmark og teir mæla øllum limum sínum til, at fyrihalda seg til tilráðingarnar frá "Komitéen for god Selskabsledelse". Síðan tilráðingarnar frá nevndini byrjaðu í 2001 eru tær broyttar fleiri ferðir. Seinasta dagføringin í desember 2020 av tilráðingunum tók við 1. januar 2021. Mælt verður til, at feløg greiða frá, um tey fylgja tilráðingunum ella ikki. Um ein tilráðing ikki verður fylgd, eigur felagið at greiða frá hvør orsøkin er til at hetta ikki verður gjørt, og hvat felagið hevur valt at gera í staðin.

Finans Danmark hevur gjørt eitt leiðsluhandrit við tilráðingum til limir sínar. Tilráðingarnar frá Finans Danmark eru meiri víttfevnandi enn lógarkrøvini og tilráðingarnar frá "Komitéen for god Selskabsledelse". Endamálið við tilráðingunum er at fáa limirnar at taka støðu til týðandi evni innan leiðslu, og at skapa størri opinleika um leiðslukarmarnar hjá limum sínum og harvið økja um álitið á bankageiran.

Sparikassin metir, at góð virkisleiðsla er ein fyritreyt fyri góðum samstarvi millum sparikassan og interessentarnar (kundar, ábyrgdarar, starvsfólk og samfelagið v.m.) um at røkka góðum úrslitum.

Frágreiðingin um góða virkisleiðslu fylgir "fylg ella greið frá" meginregluni.

## Innihald:


· Tilmæli frá "Komitéen for god Selskabsledelse" (s. 2-13)
· Tilmæli frá Finans Danmark (s. 14-17)

## Tilmæli frá "Komitéen for god Selskabsledelse"

"Komitéen for god Selskabsledelse" hevur útgivið eina røð av tilmælum um góða virkisleiðslu. Tilmælini eru at finna á corporategovernance.dk.

### 1. Felagsins samskifti og samspæl við íleggjarar og aðrar interessentar

#### 1.1. Samskifti millum felagið, partaeigarar og aðrar interessentar

1.1.1. Mælt verður til, at nevndin tryggjar eitt støðugt samskifti millum felagið og partaeigarar, soleiðis at partaeigararnir fáa viðkomandi innlit í felagsins møguleikar og politikkir, og at nevndin kennir hugburð, áhugamál og sjónarmið hjá partaeigarunum í sambandi við felagið.

Sparikassin fylgir

Sum ábyrgdarsparikassi og sjálvsognarstovnur hevur sparikassin ongar partaeigarar. Sparikassin hevði 2066 ábyrgdarar við ársenda 2022. Ábyrgdarar kunnu finna upplýsingar um sparikassans virksemi á heimasíðu sparikassans. Leiðslan hevur 2 fundir um árið við umboðsráðslimir sparikassans.

1.1.2. Mælt verður til, at nevndin samtykkir politikkir viðvíkjandi felagsins viðurskiftum mótvegis interessentum, undir hesum partaeigarar og aðrar íleggjarar. Nevndin skal eisini tryggja, at áhugamálini hjá interessentunum verða vird í samsvari við viðkomandi politikkir hjá felagnum.

Sparikassin fylgir

1.1.3. Mælt verður til, at felagið almannakunnger ársfjórðingsfrágreiðingar.

Sparikassin fylgir ikki

Sparikassin metir, at almannakunngering av lógarásettum ársroknskapi og hálvársroknskapi gevur nøktandi innlit í sparikassans roknskaparviðurskifti.

#### 1.2. Aðalfundurin

1.2.1. Mælt verður til, at nevndin í fyrireikingunum til ársaðalfundin ber soleiðis í bandi, at eigararnir hava møguleika at gera sína ávirkan galdandi yvir fyri felagnum.

Sparikassin fylgir

Umboðsráðið er hægsti myndugleiki sparikassans. Tí er talan ikki um aðalfund, men umboðsráðsfund.

1.2.2. Mælt verður til, at í fulltrúum, til nýtslu á aðalfundinum, verður givið partaeigarunum møguleika at taka støðu til hvørt einstakt punkt á dagskránni.

Sparikassin fylgir ikki

Atkvøðast kann ikki við fulltrú.

### 1.3. Yvirtøkuroynd

1.3.1. Mælt verður til, at felagið setir tilbúgvingarmannagongd fyri yvirtøkuroyndir. Tilbúgvingarmannagongdin skal fevna um tíðarskeiðið frá tí at nevndin fær grundaðan illgruna um, at yvirtøkutilboð fer at verða givið. Mannagongdin eigur at áseta, at nevndin aftrar seg við at ganga yvirtøkutilboðnum á møti uttan góðkenning frá aðalfundinum við at taka avgerðir, sum í veruleikanum forða partaeigarunum í at taka støðu til yvirtøkuroyndina.

Sparikassin fylgir ikki

Nevndin metir, at ein tilbúgvingarmannagongd fyri yvirtøkuroyndir er óneyðug, av tí at sparikassin er ein sjálvsognarstovnur og yvirtøkuroynd kann tískil ikki beinleiðis fara fram.

## 2. Uppgávur og ábyrgd hjá nevnd

### 2.1. Yvirskipaðar uppgávur og ábyrgd

2.1.1. Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga viðger tey viðurskifti, ið eru partur av teimum uppgávum, ið nevndin skal røkja.

Sparikassin fylgir

2.1.2. Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga tekur støðu til felagsins yvirskipaðu strategi, við tí í hyggju at tryggja virðisskapanina í felagnum.

Sparikassin fylgir

2.1.3. Mælt verður til, at nevndin sær til, at felagið hevur ein kapital- og partabrævabygnað, sum stuðlar undir at felagsins strategi og langtíðar virðisskapan eru í tráð við áhugamálini hjá partaeigarunum og felagnum. Harumframt at greitt verður frá hesum í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini hjá felagnum og/ella á felagsins heimasíðu.

Sparikassin fylgir

Sparikassin er ábyrgdarsparikassi og sjálvsognarstovnur og hevur ikki partaeigarar.

2.1.4. Mælt verður til, at nevndin árliga gjøgnumgongur og góðkennir reglugerð fyri stjórn, og undir hesum staðfestir krøv til stjórn um rættstundis, neyvt og nøktandi at geva frágreiðing til nevndina.

Sparikassin fylgir

2.1.5. Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga umrøður samansetingog menning, váðar og succesionsætlanir fyri stjórnina.

Sparikassin fylgir

### 2.2. Samfelagsábyrgd (Corporate Social Responsibility)

2.2.1. Mælt verður til, at nevndin samtykkir politikkir fyri samfelagsábyrgd felagsins.

Sparikassin fylgir ikki

Nevndin hevur ikki viðtikið nakran formligan politikk fyri samfelagsábyrgd.

### 2.3. Formaðurin og næstformaðurin í nevndini

2.3.1. Mælt verður til, at næstformaður verður valdur í nevndina, sum virkar fyri formannin, skuldi hesin fingið forfall, og annars virkar sum ein góður sparringspartnari hjá formanninum.

Sparikassin fylgir

2.3.2. Mælt verður til, at um nevndin hendingaferð biður nevndarformannin ella aðrar nevndarlimir um at gera serligar uppgávur fyri felagið, herundir í stutt skeið at taka lut í dagligu leiðsluni, skal fyriliggja ein nevndaravgerð um hetta, við tí fyrivarni at tryggja, at nevndin varðveitir tað yvirskipaðu leiðsluna og eftirlitsskipanina. Avtalur um luttøku formansins ella nevndarlimsins í tí dagligu leiðsluni og um hvussu leingi luttøkan væntast at vara, skal verða fráboðað í fráboðan frá felagnum.

Sparikassin fylgir

Hetta hevur ikki verið viðkomandi støða í farna roknskaparári.

## 3. Samanseting og skipan av nevnd

### 3.1. Samanseting

3.1.1. Mælt verður til, at nevndin árliga metir um og í leiðslufrágreiðingini lýsir:
· hvørjar førleikar nevndin skal ráða yvir fyri best møguligt at kunna røkja sínar skyldur,
· samansetingina av nevndini, umframt
· serligu førleikunum hjá einstøku limunum.

Sparikassin fylgir

3.1.2. Mælt verður til, at nevndin árliga umrøður virksemi felagsins fyri at tryggja, at felagið hevu eitt viðkomandi fjølbroytni í felagsins leiðslustigum, og harumframt ger og samtykkir ein politik fyri fjølbroytni og at hesin verður lýstur á heimasíðu felagsins.

Sparikassin fylgir

3.1.3. Mælt verður til, at útveljing og innstilling av valevnum til nevndina verður gjørd við nærlagni og fyri nevnd á ein gjøgnumskygnan hátt, sum nevndin hevur góðkent. Tá mett verður um samanseting og instilling av valevnum skal umframt tørv á førleikum og útbúgving eisini takast atlit til tørv á endurnýggjan og fjølbroytni.

Sparikassin fylgir

3.1.4. Mælt verður til, at tað saman við innkallingini til aðalfundin, har nevndarval er á skrá, umframt ásetingarnar í lóggávuni, verður send út ein lýsing av førleilkunum hjá teimum uppstillaðu valevnunum og uppýsingar um
· onnur leiðslustørv, undir hesum sessir í nevndum, stjórnum, eftirlitsráðum, íroknað leiðslunevnd í útlendskum fyritøkum,
· krevjandi fyriskipanaruppgávur.
Umframt hetta skal upplýsast um valevnini til nevndina verða mett sum óheft.

Sparikassin fylgir

3.1.5. Mælt verður til, at limir í felagsins stjórn ikki eru nevndarlimir og at ein fráfarandi forstjóri ikki fer beinleiðis inn í felagsins nevnd sum formaður ella næstformaður

Sparikassin fylgir

3.1.6 Mælt verður til, at teir aðalfundarvaldu nevndarlimirnir standa fyri vali hvørt ár á tí regluliga aðalfundinum.

Sparikassin fylgir ikki

Sambært viðtøkum sparikassans sita teir av umboðsráðnum valdu nevndarlimir í 3 ár í senn. Hvørt ár standa 2 limir fyri vali.

Nevndin metir, at nú-verandi valskipan tryggjar framhald og støðuleika í nevndararbeiðinum.

## 3.2. Óheftni nevndarinnar

3.2.1. Mælt verður til, at í minsta lagi helvtin av aðalfundarvaldu nevndarlimunum eru óheftir, soleiðis at nevndin kann virka óheft av seráhugamálum.

Fyri at vera óheftur, má viðkomandi ikki:
· vera ella innan seinastu 5 árini hava verið limur í stjórnini ella leiðandi starvsfólk í felagnum, einum dótturfelag ella einum assosieraðum felag,
· innan seinastu 5 árini hava móttikið størri samsýning frá felagnum/samtakinum, einum dótturfelag ella einum assosieraðum felag í øðrum eginleika enn limur í nevndini,
· umboða áhugamál hjá ella hava tilknýti til ráðandi partaeigara,
· innan seinasta árið hava havt eitt týðandi handilssamband (t.d. persónligt ella óbeinleiðis sum partnari ella starvsettur, partaeigari, kundi, veitari ella limur í leiðsluni í feløgum við líknandi sambondum) við felagið, eitt dótturfelag ella eitt assosierað felag,
· vera ella innan seinastu 3 árini hava verið starvsettur ella partnari hjá uttanhýsis grannskoðara,
· vera stjóri í einum felag, sum hevur tvørgangandi leiðsluumboðan við felagið,
· hava verið nevndarlimur í meiri enn 12 ár, ella
· vera í tøttum familjusambondum við persónar, sum ikki kunna metast at vera óheftir.
Hóast ein nevndarlimur ikki er fevndur av omanfyristandandi eyðkennum kunnu tað vera onnur viðurskifti sum gera, at nevndin tekur avgerð um, at ein ella fleiri nevndarlimir ikki kunnu roknast at verða óheftir.

Sparikassin fylgir

## 3.3. Nevndarlimir og tal av øðrum leiðslustørvum

3.3.1. Mælt verður til, at hvør einstakur nevndarlimur metir um, hvussu nógv tíð er neyðug at brúka upp á nevndararbeiði, soleiðis at viðkomandi ikki tekur á seg fleiri størv enn at hvørt einstakt starv kann útinnast á ein nøktandi hátt fyri felagið.

Sparikassin fylgir

3.3.2. Mælt verður til, at leiðslufrágreiðingin, umframt ásetingarnar í lóggávuni, inniheldur hesar upplýsingar um nevndarlimirnar:
- starvið hjá viðkomandi,
- aldur og kyn hjá viðkomandi,
- førleikar og útbúgving hjá nevndarliminum, sum er viðkomandi fyri felagið,
- hvørt limurin verður mettur at vera óheftur,
- tíðspunkt tá nevndarlimurin kom inn í nevndina,
- nær galdandi valtíðarskeiðið gongur út,
- uppmøting hjá viðkomandi til fundir í nevnd og undirnevndum,
- onnur leiðslustørv, undir hesum sessir í stjórnum, nevndum, eftirlitsráðum, íroknað leiðslunevndum í útlendskum feløgum, umframt
- krevjandi fyriskipanaruppgávur, og
- nøgd av partabrøvum, optiónum, warrants og líknandi í felagnum og tey, gjøgnum felagið knýttu samtaksfeløgum, sum nevndarlimurin eigur, og tær broytingar í virðisbrævagoymslu hjá nevndarliminum av nevndu virðisbrøvum, sum eru farnar fram í roknskaparárinum.

Sparikassin fylgir lutvíst

Sparikassin hevur ongar partaeigarar, og tískil kann ikki upplýsast um nøgd av partabrøvum hjá nevndarlimum í sparikassanum.

Sparikassin upplýsir ikki uppmøting hjá hvørjum einstøkum nevndarlimi, men upplýsir samlaðu uppmøtingina til fundir.

3.3.3 Mælt verður til, at tann árliga eftirmetingin av nevnd tekur atlit til hvat er hóskandi fyri ein nevndarlim, tá tað snýr seg um onnur leiðslustørv og at atlit verða tikin til bæði tal, stig og margfeldi viðvíkjandi hvørjum einstøkum av hesum.

Sparikassin fylgir

## 3.4. Undirnevndir

3.4.1. Mælt verður til, at felagið á heimasíðu felagsins almannakunnger:
- arbeiðssetningar hjá undirnevndunum,
- høvuðsvirksemi hjá undirnevndunum í árinum og talið av fundum í hvørjari nevnd, umframt
- nøvnini á umboðunum í teimum einstøku undirnevndunum, undir hesum nevndarformenn og upplýsing um, hvørjir limir eru óheftir og hvørjir eru limir við serligum førleikum.

Sparikassin fylgir

Kommissorium fyri tilráðingarnevnd sæst á heimasíðu sparikassans.

3.4.2. Mælt verður til, at meirilutin av undirnevndarlimunum eru óheftir.

Sparikassin fylgir

3.4.3. Mælt verður til, at nevndin setur eina grannskoðanarnevnd, sum er samansett soleiðis, at
- nevndarformaðurin er ikki formaður fyri grannskoðanarnevndina, og at
- grannskoðanarnevndin tilsamans hevur serkunnleika og royndir, at hon hevur eitt dagført innlit í og royndir við fíggjarviðurskiftum og roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum hjá feløgum, sum hava partabrøv teknað til handil á einum skipaðum marknaði.

Sparikassin fylgir ikki

Nevndin tók í 2021 avgerð um, at avtaka grannskoðanarnevndina. Hetta verður mett at verða forsvarligt við tað at arbeiðið hjá grannskoðanarnevndini kann røkjast av nevnd sparikassans.

| | |
|---|---|
| 3.4.4. Mælt verður til, at grannskoðanarnevndin, áðrenn góðkenning av ársfrágreiðingini og aðrari fíggjarligari frágreiðing, hevur eftirlit við og gevur frágreiðing til nevndina um:<br>· nýttan roknskaparhátt á týðandi økjum,<br>· týðandi roknskaparligar metingar,<br>· handlar við nærstandandi partar, og<br>· óvissur og váðar, undir hesum eisini í samband við vánirnar fyri inniverandi ár. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Víst verður til pkt. 3.4.3 omanfyri. |
| 3.4.5. Mælt verður til, at grannskoðanarnevndin:<br>· árliga metir um tørvin á eini innanhýsis grannskoðan, og um so er, kemur við tilráðing um útveljing, setan í starv, uppsøgn av leiðaranum í møguligari innanhýsis grannskoðan, og fíggjarætlanini hjá innanhýsis grannskoðanini, og<br>· ansar eftir, at um so er, at felagið hevur sett á stovn innanhýsis grannskoðan, at tað verður gjørd ein starvslýsing fyri hesa og at henda verður góðkend av nevnd,<br>· ansa eftir, at um so er, at felagið hevur sett á stovn innanhýsis grannskoðan, at hendan verður tillutað nóg mikið av arbeiðsmegi og førleikum at fremja ásetta arbeiðið, og<br>· hevur eftirlit við framhaldsviðgerðini hjá stjórnini viðvíkjandi niðurstøðum og tilmælum hjá innanhýsis grannskoðanini. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Víst verður til pkt. 3.4.3 omanfyri. |
| 3.4.6. Mælt verður til, at nevndin setur á stovn ein tilráðingarbólk, sum í minsta lagi hevur hesar fyrireikandi uppgávur:<br>· lýsir førleikarnar, sum eru neyðugir í nevndini og stjórnini og til eitt ávíst starv, og at áseta tíðina, tað verður mett skal setast av til at røkja starvið og eisini meta um førleikar, vitan og royndir, sum eru í teimum báðum leiðsluskipanunum,<br>· árliga meta um bygnaðin, støddina, samansetingina og úrslit hjá stjórn og nevndini og eisini geva tilráðing til nevndina um møguligar broytingar,<br>· árliga meta um førleikar, vitan og royndir og succesión hjá nevndarumboðunum og eisini geva nevndini frágreiðing um hetta,<br>· innstilla evni til nevnd og stjórn og<br>· seta fram uppskot til nevndina um eina virkisætlan um framtíðar samanseting av nevndini, undir hesum uppskot til ítøkiligar broytingar. | Sparikassin fylgir |
| 3.4.7. Mælt verður til, at nevndin setur á stovn eina lønarnevnd, sum í minsta lagi hevur hesar fyrireikandi uppgávur:<br>· tilráða lønarpolitikkin, (undir hesum "Yvirskipaðar leiðreglur fyri avriksløn") fyri nevnd og stjórn til góðkenning av nevnd áðrenn hetta verður góðkent av aðalfundi,<br>· seta fram uppskot til nevndina um samsýning til nevndarlimir og stjórn og at tryggja, at samsýningin er í tráð við lønarpolitikkin hjá felagnum og metingin av avrikinum hjá viðkomandi. Lønarnevndin skal hava kunnleika um samlaðu samsýningina, sum nevndarlimir og stjórn fáa frá øðrum feløgum í samtakinum, og<br>· tilráða ein samsýningarpolitikk, sum alment er galdandi í felagnum, og<br>· hjálpa til við at fyrireika árligu frágreiðingina um samsýning. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Nevndin tók í 2021 avgerð um, at avtaka lønarnevndina. Hetta verður mett at verða forsvarligt við tað at arbeiðið hjá lønarnevndini kann røkjast av nevnd sparikassans. |

| | |
|---|---|
| 3.4.8. Mælt verður til, at tilráðingarbólkurin ikki brúkar somu uttanhýsis ráðgevarar sum stjórnin í felagnum. | Sparikassin fylgir |

### 3.5. Eftirmeting av arbeiðnum í nevndini og stjórnini

| | |
|---|---|
| 3.5.1. Mælt verður til, at nevndin ger eina mannagongd fyri árligari eftirmeting av nevndini sum heild og einstøku nevndarlimunum. Uttanhýsis ráðgevarar eiga í minsta lagi triðja hvørt ár at verða tiknir við í eftirmatingina. Í eftirmetingini eigur m.a. at metast um:<br>· íkast og úrslit,<br>· samstarv við stjórn,<br>· formansins leiðsla av nevnd,<br>· samanseting av nevnd (undir hesum førleikar, margfeldi og tal av nevndarlimun),<br>· arbeiðið í undirnevndum og nevndarbygnaður, og<br>· tilrættalegging av arbeiðinum og dygdin av tí tilfari nevndin fær.<br>Eftirmetingarhátturin og yvirskipaðar niðurstøður eiga at vera lýstar í leiðslufrágreiðingini og á heimasíðu felagsins. Formaðurin eigur at greiða frá eftirmetingini av nevnd, undir hesum hvussu eftirmetingin er farin fram og yvirskipaðu niðurstøðunum á umboðsráðsfundinum áðrenn val av nevndarlimum fer fram. | Sparikassin fylgir |
| 3.5.2. Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga metir um arbeiðið og úrslitini hjá stjórnini sambært frammanundan ásettum metingarstøði. Harafturat eigur nevndin at meta um tørvin á broytingum í stjórnarbygnaði og samanseting av stjórn við atliti til felagsins strategi. | Sparikassin fylgir |
| 3.5.3. Mælt verður til, at stjórnin og nevndin áseta eina mannagongd, har nevndarformaðurin og forstjórin við formligari samrøðu meta um samstarvið sínámillum, og at úrslitið av metingini verður lagt fyri nevndina. | Sparikassin fylgir |

## 4. Samsýning hjá leiðsluni

### 4.1. Formur og innihald í lønarpolitikkinum

| | |
|---|---|
| 4.1.1. Mælt verður til, at nevndin ger ein greiðan og einfaldan lønarpolitikk fyri nevnd og stjórn, sum hevur<br>· eina nágreiniliga frágreiðing av samsýningarlutunum, sum eru í samsýningini til nevnd og stjórn,<br>· eina grundgeving fyri valinum av samsýningarlutunum, og<br>· eina frágreiðing av fyritreytunum, sum eru grundarlagið í javnvágini millum samsýningarlutirnar<br>· eina frágreiðing um samanhangin millum lønarpolitikkin og felagsins langskygdu virðisskapan og viðkomandi mál hesum viðvíkjandi.<br>Lønarpolitikkurin eigur í minsta lagi hvørt fjórða ár og annars hvørja ferð ein munandi broyting verður gjørd at verða góðkend av aðalfundinum og almannakunngjørd á heimasíðu felagsins. | Sparikassin fylgir lutvíst |

| | |
|---|---|
| 4.1.2. Mælt verður til, um lønarpolitikkurin hevur skiftiligar lønarlutir, at tað verður<br>· ásett mark fyri teimum skiftiligu lønarlutunum av samlaðu samsýningini,<br>· tryggjað eina hóskandi og javnvigaða samanseting millum leiðslusamsýning, og virðisskapanina fyri partaeigararnar yvir styttri og longri tíðarskeið,<br>· greidleiki um, hvussu úrslit verða máld í teimum skiftiligu lønarlutunum,<br>· tryggjað, at skiftandi lønarlutur ikki bert er samansettur av lønarlutum, sum fevna um stutt tíðarskeið og at teir lønarlutir, sum fevna um longri tíðarskeið skulu hava eitt forvinnings- og búnaðartíðarskeið uppá í minsta lagi trí ár, og<br>· gjørd avtala, sum gevur felagnum rætt til í heilt serligum førum at krevja fulla ella lutvísa afturgjalding av skiftiliga lønarlutinum, sum er útgoldin eftir grundarlagi, sum aftaná kunnu skjalprógvast at vera skeivar. | Sparikassin fylgir<br><br>Lønarpolitikkur sparikassans inniheldur ikki skiftiligar lønarlutir. |
| 4.1.3. Mælt verður til, at nevndarlimir ikki verða løntir við partabrævaoptiónum ella tekningsoptiónum. | Sparikassin fylgir |
| 4.1.4. Mælt verður til, at um partabrævatengd samsýning verður brúkt, skulu skipanirnar vera revolverandi, tvs. tillutast skeiðbundið og skulu hava eina gildistíð upp á í minsta lagi 3 ár eftir tillutan. | Sparikassin fylgir<br><br>Nevndarlimir verða samsýntir við føstum samsýningum. |
| 4.1.5. Mælt verður til, at avtalur um fráfaringarsamsýning í mesta lagi hava eitt virði, sum svarar til samsýningina tvey tey seinastu árini íroknað allar samsýningarlutir. | Sparikassin fylgir |

## 4.2. Upplýsing um lønarpolitikkin

| | |
|---|---|
| 4.2.1. Mælt verður til, at lønarpolitikkurin hjá felagnum og hvussu hesin verður hildin, skal greiðast frá og grundgevast í formansfrágreiðingini á aðalfundi felagsins. | Sparikassin fylgir |
| 4.2.2. Mælt verður til, at partaeigararnir á aðalfundinum viðgera uppskot til góðkenning av samsýning til nevndina fyri inniverandi roknskaparár. | Sparikassin fylgir |
| 4.2.3. Mælt verður til, at tað verður gjørd ein frágreiðing um samsýning har upplýst verður um samsýningina tilsamans hvør nevndarlimur og stjórn fær frá felagnum og øðrum feløgum í samtakinum og associeraðum feløgum seinastu trí árini, undir hesum upplýsir týðandi innihald í varðveitingar- og fráfaringarskipanum, og at greitt verður frá samanhanginum millum samsýning og felagsins strategi og viðkomandi mál í hesum sambandi. Frágreiðingin eigur at verða almannakunngjørd á heimasíðu felagsins. | Sparikassin fylgir lutvíst |

## 5. Ger av roknskapi, váðastýring og grannskoðan

### 5.1. Eyðmerking av váðum og opinleiki um fleiri viðkomandi upplýsingar

| | |
|---|---|
| 5.1.1. Mælt verður til, at nevndin tekur støðu til og í leiðslufrágreiðingini greiðir frá teimum týðandi strategisku og handilsligu váðunum, váðum í sambandi við ger av roknskapi, umframt váðastýringini hjá felagnum. | Sparikassin fylgir |

### 5.2. Whistleblower-skipan

| | |
|---|---|
| 5.2.1. Mælt verður til, at nevndin avger, hvørt ein whistleblower-skipan skal setast í verk, við tí í hyggju at geva møguleika til eina hóskandi frágreiðing, sum skal vera í trúnaði, um álvarslig misbrot ella um illgruni er um hetta. | Sparikassin fylgir lutvíst<br><br>Sparikassin hevur sambært lóg um fíggjarvirksemi stovnsett eina innanhýsis whistleblower-skipan, har starvsfólk kunnu fráboða brot ella møgulig brot á fíggjarligu lóggávuna. |

### 5.3. Samband við grannskoðara

| | |
|---|---|
| 5.3.1. Mælt verður til, at nevndin tryggjar eitt regluligt samskifti millum aðalfundarvaldan grannskoðara og nevnd, undir hesum at nevndin og grannskoðanarbólkurin í minsta lagi árliga møtir grannskoðaranum, har stjórnin ikki er tilstaðar. Sama er galdandi fyri innanhýsis grannskoðara, um slíkur er. | Sparikassin fylgir<br><br>Sí tó viðmerking undir pkt. 3.4.3 omanfyri. |
| 5.3.2. Mælt verður til, at grannskoðaraavtalan og samsýning til grannskoðara verður avtalað millum nevndina og aðalfundarvaldan grannskoðara við støði í tilmæli frá grannskoðarabólkinum. | Sparikassin fylgir<br><br>Sí tó viðmerking undir pkt. 3.4.3 omanfyri. |

## Tilmæli frá Finans Danmark

Finans Danmark hevur gjørt eitt leiðsluhandrit við tilmælum til limir sínar. Tilmælini frá Finans Danmark eru meiri víttfevnandi enn lógarkrøvini og tilmælini frá "Komitéen for god Selskabsledelse". Tilmælið er gjørt av Finansrådet í november 2013.

| Tilmæli | | |
|---|---|---|
| 1. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark taka støðu til øll tilmælini frá "Komitéen for god selskabsledelse". | Sparikassin fylgir |
| 2. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark gera og almannakunngera eina atferðarlóg (code of conduct), sum greiðir frá virðisgrundarlagnum hjá felagnum og ynskta atferð í rakstri og leiðslu hjá felagnum. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Sparikassin metir, at almenningurin fær nøktandi kunnleika til virðisgrundarlag og ynskta atferð í rakstri og leiðslu gjøgnum dagliga virksemi sparikassans. Haraftrat kemur virðisgrundarlag sparikassans og atferð til sjóndar í ársfrásøgnini, ið er at finna á heimasíðuni. |
| 3. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark brúka eina gjølliga lýsta og skipaða tilgongd í sambandi við útvegan av valevnum til nevnd og møguliga gera nýtslu av uttanhýsis førleikum. | Sparikassin fylgir |
| 4. | Mælt verður til, at um limirnir í Finans Danmark hava ásetingar í viðtøkunum um, at nevndarlimir einans skulu veljast innanfyri avmarkaðan bólk av persónum, greiða frá grundgevingunum fyri hesum avmarkingum. | Sparikassin fylgir<br><br>Viðtøkurnar hava ikki slíka avmarking. |
| 5. | Mælt verður til, at nevndarlimir skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 6 mánaðir eftir nevndarval, byrja eina útbúgvingartilgongd í rakstri av banka, um nevndarlimurin ikki longu hevur dagførdar og serligar bankaførleikar. Tilgongdin skal taka støði í støddini á felagnum, virkisgrundarlagi og kompleksiteti. | Sparikassin fylgir |
| 6. | Mælt verður til, at nevndarlimirnir fáa áhaldandi førleikamenning, um tað er viðkomandi fyri nevndararbeiði. Evni og savið skal vera tillagað støddini á felagnum, virkisgrundarlagi og kompleksiteti. | Sparikassin fylgir |
| 7. | Mælt verður til, at hvør einstakur nevndarlimur árliga metir um sítt arbeiði í nevndini. Nevndarlimurin skal, sum liður í metingini, fylla út eitt metingaroyðiblað, sum viðvíkur øki bæði innan leiðslu og bankatøkni. | Sparikassin fylgir |

| | | |
|---|---|---|
| 8. | Mælt verður til, at viðkomandi fakserfrøðingar verða tiknir við í arbeiðið hjá nevndini, undir hesum luttøku á nevndarfundum við serliga kompleksum málum. | Sparikassin fylgir |
| 9. | Mælt verður til, at samstarvið millum stjórn og nevnd verður viðgjørt í minsta lagi árliga. Stjórnin skal ikki vera til staðar undir hesari viðgerð. | Sparikassin fylgir |
| 10. | Mælt verður til, at á heimasíðuni hjá limunum í Finans Danmark ella á samsvarandi hátt verður almannakunngjørt eitt yvirlit av luttøku hjá nevndarlimum á nevndarfundum og fundum í undirnevndum. | Sparikassin fylgir ikki<br><br>Nevndin hevur í 2022 havt tilsamans 14 nevndarfundir. Umframt hetta hava 6 fundir verið í undirnevndum. Nevndin leggur stóran dent á, at uppmøtingin er góð. Tá uppmøtingin til nevndarfundirnar í 2022 hevur verið omanfyri 90% metir nevndin ikki, at orsøk er til at kunnað meira nágreiniligt. |
| 11. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark taka støðu til ásetingarnar um loft av leiðslupostum ásett í lóg um fíggjarligt virksemi. | Sparikassin fylgir |
| 12. | Mælt verður til, at limirnir í Finans Danmark hava eyga við leiklutinum hjá uttanhýsis grannskoðara og dygdini av arbeiðnum, sum verður gjørt. Limirnir skulu m.a. seta krøv til samansetingina av teimum liðum, sum uttanhýsis grannskoðari brúkar, so tryggjast kann, at í minsta lagi tveir royndir grannskoðarar eru á liðnum við ískoytis førleikaøkjum. Fyri at vera royndur grannskoðari, skal viðkomandi hava gjøgnumført eftirútbúgving málrættað peningastovnsøkinum, umframt luttikið í grannskoðan av banka, sparikassa ella "andelskasse" í minsta lagi 3 ár. | Sparikassin fylgir |

NORÐOYA
SPARIKASSI



**Høvuðsdeildin**
Hovedafdeling
Ósávegur 1 Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. +298 475000
Fax +298 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

**Deildin í Fuglafirði**
Fuglafjørður afdeling
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 475000

**Deildin í Tórshavn**
Tórshavn afdeling
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000
Fax +298 476015

**ns.fo**